# Noreg vann EM-gullið

**Í einari spennandi EM-finalu eydnaðist tað Noreg at vinna á Danmark og harvið tryggja sær gullið. Danir eru tó vælnøgdir, tí eingin hevði væntað nakað av nýggja danska liðnum**

EM-HONDBÓLTUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Norski liðskiparin Gro Hammerseng og Josephine Touray hjá Danmark í nærdysti undir EM-finaluni sunnudagin. Tær báðar eru til dagligt liðfelagar í danska felagnum Ikast/Bording, og báðar blivu tær valdar til All-Star liðið fyri EM-endaspælið*

Talan var um eina reina norðurlendska finalu í EM-endaspælinum í hondbólti fyri kvinnur, sum júst hevur verið í Ungarn. Noreg og Danmark hittust í finaluni, og tað var eitt sindur óvæntað. Tað var ikki so óvæntað, at Noreg skuldi verða annar luttakarin í finaluni, men hinvegin var tað ógvuliga óvæntað, at Danmark skuldi koma so langt, tí talan var um eitt so at siga spildurnýtt danskt lið, ið skuldi nýta EM-endaspælið sum eitt høvi til at fáa nýggja liðið samanspælt.

### Løtt uppgáva hjá Noreg í hálvfinaluni

Tey flestu hildu óivað, at talan fór at verða um eina trupla uppgáva hjá Noreg í hálvfinaluni leygardagin, tá ið tær skuldu spæla móti lokalu favorittunum úr Ungarn, men so var ikki. Noreg vann ein knúsandi sigur á vertunum, og tølini 44-29 tala fyri seg í so máta.

Danmark hevði eisini ein trupla uppgávu í hálvfinaluni, tá ið tær skuldu dystast við stóru kvinnurnar úr Russlandi. Hesin dysturin gjørdist eisini væl javnari, og tað var ikki fyrr enn móti endanum av dystinum, at donsku kvinnurnar fingu luft niður til mótstøðuliðið, og tær vunnu dystin 31-27.

### Persónlig mistøk kostaðu

Finalan millum tey bæði norðurlendsku liðini var ógvuliga jøvn og spennandi, og eitt skifti sá tað út til, at Danmark fór at strúka avstað við gullinum framman fyri nøsini á norsku favorittunum, men nøkur persónlig mistøk kostaðu danska liðnum dýrt seinastu løtuna av dystinum.

Danmark hevði annars verið á odda, tá ið ikki so nógv tíð var eftir at leika, men so vóru tað kanska tey so vælkendu gummibeinini ella armarnir, sum fóru at gera vart við seg. Kanska týdningarmiklasta persónliga mistakið kom stutt fyri tíð, tá ið Noreg var á odda 26-25. Danmark var í álopi, men Mette Sjøberg, sum annars hevur verið ein av mest eyðsýndu leikarunum á danska liðnum í EM-endaspælinum, misti óneyðugani bóltin, og norsku kvinnurnar kundu gera skjótt av og fara oman í hin endan av vøllinum og skora til endaliga úrslitið 27-25 ístaðin fyri, at Danmark kanska hevði javnað til 26-26.

Fagnaðurin á norsku kvinnunum var sjálvsagt ovurhonds stórur, nú tær endiliga høvdu bast Danmark, sum tær so mangan áður hava tapt stórar finalur ímóti. Í Danmark eru tey hinvegin ikki vónbrotin av finaluósigrinum.

Gamaní hevði Danmark við eitt sindur av hepni kunna ognað sær gullið, men undan EM-endaspælinum var tað neyvan nakar hondbóltsserfrøðingur í Danmark, sum hevði roknað við, at kvinnulandsliðið skuldi standa seg so mikið væl í kappingini. Tey flestu mettu, at liðið fór at spæla seg til millumspælið, men so var eisini liðugt. Tí verður úrslitið hjá donsku kvinnunum mett sum ómetaliga gott, og liðið kann venda aftur til Danmarkar við æru.

## Svenskur landsliðsleikari til Tottenham

Enska felagið Tottenham keypti mánadagin svenski landsliðsleikaran Christian Wilhelmsson frá belgiska Anderlecht. Tottenham rindar Anderlecht umleið 30 milliónir krónur fyri svenska vongspælaran.

## Allan Simonsen farin frá

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjari Allan Simonsen er farin frá sum venjari hjá Luxembourg.

Hetta upplýsti fótbóltssambandið í Luxembourg fríggjadagin. Allan Simonsen hevði annars hálvtannað ár eftir av sáttmálanum hjá sær, men nú eru partarnir blivnir samdir um, at samstarvið teirra millum er komið at enda.

Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá Luxembourg undir leiðslu av Allan Simonsen.

## Nýggjur áleypari á veg til FCK

Danska Ekstrablaðið vil vera við, at álopsspælarin hjá AaB, David Nielsen, fríggjadagin var á fundi við leiðsluna í felagnum FC Keypmannahavn.

David Nielsen hevur áður spælt fyri FCK, og nú sigst leiðslan í felagnum vilja hava hann aftur at spæla fyri teir.

– Tað passar, at eg var í Parkini herfyri, men eg var bara inni á gólvinum og heilsaði upp á fólk, sum eg kenni har, sigur 27 ára gamli David Nielsen við Ekstrablaðið.

## Eingin er betur enn Chelsea

Chelsea-venjarin Jose Mourinho er fullur av sjálvsáliti bæði viðvíkjandi sær sjálvum og viðvíkjandi liðnum hjá sær. Tískil hevur hann ikki ilt við at melda út, hvat hann væntar sær av kappingini í Premier League í ár.

– Eg rokni við, at vit fáa 90 stig í ár, og eg trúgvi uppá tað. Eg havi stórt álit á, at vit vinna Premier League, og vit noyðast ikki at hugsa um, hvussu hini liðini spæla. Tey hava eina nógv truplari uppgávu, tí tey verða noydd til at lurta eftir útvarpinum og vóna, at tey hoyra, at vit missa stig, sigur portugisiski venjarin.

Spurdur, hvat kann steðga Chelsea, sigur Mourinho: - Tað er bert eitt lið, ið er betri enn vit, sum kann steðga okkum, og í løtuni er eingin betur enn vit, sigur venjarin hjá enska oddaliðnum Chelsea.